# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Býráðið

**Dagfesting:** 25.01.2024 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Ólavur Larsen

Varalimir: Sheila Sigurdsdóttir fyri David Andreasen, Bergtóra Cederiusdóttir fyri Sonna á Horni og Bartal Eliasen fyri Magna Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/24 | 24/00045-1 | Innkalling av Bartal Eliasen, Bergtóru Cederiusdóttir og Sheilu Sigurdsdóttir Sóldal, sum varalimir, til býráðsfundin 25.01.2024 |
| 2/24 | 23/00563-5 | Umsókn um víðkan av goymslutunlum |
| 3/24 | 23/00563-6 | Umsókn um leingjan av fóðurbryggju |
| 4/24 | 23/00579-1 | Ognartøka av lendi til víðkan av Innandalsvegnum |
| 5/24 | 23/00593-3 | Umsókn um byggiloyvi til frystitunnil og goymslutunnil |
| 6/24 | 24/00021-3 | Umsókn um byggiloyvi til kai |
| 7/24 | 23/00482-1 | Skipa, vøru- og leigugjøld fyri Fuglafjarðar havn endurskoðast |
| 8/24 | 23/00373-3 | Kappingarskrá til hugskotskapping um miðbýarætlan Fuglafirði |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 1/24
## 24/00045-1 Innkalling av Bartal Eliasen, Bergtóru Cederiusdóttir og Sheilu Sigurdsdóttir Sóldal, sum varalimir, til býráðsfundin 25.01.2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.01.2024 | 1/24 |

**Tilráðing**

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Býráðnum</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Magni Jøkladal, Sonni á Horni og David Andreasen, hava forfall til býráðsfundin 25. januar 2024 kl. 19:00 og ynskja, við heimild í § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini, at varalimir møta fyri seg á býráðsfundinum<br><br>Fjóðrvaldi á lista B, Kristian Martin Petersen hevur boðað frá at tað ikki ber til hjá honum at møta. Tí er fimtvaldi á lista B(við lutakasti) Bartal Eliasen innkallaður til býráðsfundin.<br><br>Fjórðvalda á lista Á Lillian Jacosen hevur boðað frá at hon metir seg vera ógegniga at luttaka á býráðsfundinum, tí hon sum leiðari á teknisku deild stendur aftan fyri málini sum er á skrá. Næst á lista Á er Bergtóra Cederiusdóttir.<br><br>Fjórðvald á lista F er Sheila Sigurdsdóttir Sóldal.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 25. januar 2024 gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimunum Bartal Eliasen, Bergtóru Cederiusdóttir og Sheilu Sigurdsdóttir Sóldal eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Magni Jøkladal, Sonni á Horni og David Andreassen býráðslimi havaforfall til býráðsfundin 25. januar 2024 kl. 19:00.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Kommunustýrislógin, kapittul 3.<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td>Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
</table>

2

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Bartal Eliasen, Bergtóra Cederiusdóttir og Sheila Sigurdsdóttir Sóldal taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 25. januar 2024 kl. 19:00 | | |
| Dagf | 22.01.2024 | | |

**Býráðið 25. januar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við, at Bartal Eliasen, Bergtóra Cedriusdóttir og Sheila Sigurdsdóttir Sóldal taka sæti á býráðsfundinum 25. januar 2024.

3

**2/24**
**23/00563-5 Umsókn um víðkan av goymslutunnulum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.01.2024 | 3/24 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 2/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd og Býráði | | |
| Stutt lýsing av málinum | Havsbrún søkir um at økja um tunnilsgoymslu | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Havsbrún søkir um at økja um tunnilsgoymslu við 2 tunnulum við møguleika at gera tann triða tunnilin.<br>Tekniska deild mælir til at geva byggiloyvi við fylgjandi treytum:<br>- Verandi og komandi tunlar skulu matrikulerast. Víst verður til - Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.<br>- Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>- Bruna- og tilbúgvingarætlan verður gjørd til allar tunlarnar.<br>- Tunlarnir skulu gerast út við neyð- og rýmingarljósi, ávaringarskipan, $CO_2$ følara og øllum neyvum følarum til nýtsluna, brunaskápum, UHF- sambandi.<br>- Neyðugt luftskifti skipan verður gjørd í allar tunnlarnar.<br>- Luftskiftis skipanin skal kunna virka sum brunaventilatión.<br>- Neyðugt geologiskt tilfar verður gjørt/fyriliggur áðrenn byrja verður.<br>- Tilfarið frá tunnilinum ikki verður lagt á havnalagnum uttan nærri avtalu.<br>- Byggiharrin teknar neyðugar tryggingar av/fyri arbeiðinum, herundir spreingitrygging.<br>- Neyðug krøv til spreingitryggingina skulu gerast. | | |
| Grundarlag | • Umsókn um tunnilsgoymslu við tekningum | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |

4

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva treytað byggiloyvi samb. fylgjandi treytum:<br>-Verandi og komandi tunnlar skulu matrikulerast. Víst verður til - Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.<br>-Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>-Bruna- og tilbúgvingarætlan verður gjørd til allar tunnlarnar.<br>-Tunnlarnir skulu útgerast við neyð- og rýmingarljósi, ávaringarskipan, CO2 følara og øllum neyvum følarum til nýtsluna, brunaskápum, UHF-sambandi.<br>-Neyðugt luftskifti skipan verður gjørd í allar tunnlarnar.<br>-Luftskiftis skipanin skal kunna virka sum brunaventilatión.<br>-Neyðugt geologiskt tilfar verður gjørt/fyriliggur áðrenn byrja verður.<br>-Tilfarið frá tunnilinum ikki verður lagt á havnalagnum uttan nærri avtalu við havnastjóran og tekniska leiðara.<br>-Byggiharrin teknar neyðugar tryggingar av/fyri arbeiðinum, herundir spreingitrygging.<br>-Neyðug krøv til spreingitryggingina skulu gerast. |
| Dagf | 09.01.2024 |



**Vinnu- og havnanevndin 16. januar 2024:**
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 25. januar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og Vinnu- og Havnanevndini.

## 3/24
## 23/00563-6 Umsókn um leingjan av fóðurkai

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.01.2024 | 4/24 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 3/24 |

### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd og Býráð |
| Stutt lýsing av málinum | Havsbrún søkir um at leingja fóðurkai |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Havsbrún søkir um at leingja fóðurkai við tilsamans 99x100 metrum<br>Tekniska deild mælir til at geva byggiloyvi við fylgjandi treytum:<br>- Havsbrún fær ein umhvørvisárinsmeting, Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, gjørda áðrenn arbeiði fer í gongd.<br>- At víðkanin av fóðurbryggjuni verður hildin eftir byggisamtyktini og sáttmála við P/F Havsbrún §1, 98,2x97m.<br>- Allur nýggji kaikantur verður gjørdur við spunsl.<br>- Dýpið við bryggjukanti verður avgjørt í samráð við Havnameistaran.<br>- Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>- Bruna- og tilbúgvingaræltan verður gjørd.<br>- Innsatsvegur verður min. 9 metur breiður parallelt við endan og min. 12 metur breiður parallelt við langsíðu á komandi bygningum á økinum.<br><br>Somuleiðis mælir tekninska deild til, at kommuna setur eina kanning í verk av rák/útskifting/súður av sjógvinum á fjørðinum. Har meinast við, at ein útrokning/kanning verður gjørd og at eitt fysiskt model verður gjørt, ið vísir viðurskiftini bæði núverandi støða og komandi broyting. Hendan kanning kann eisini brúkast seinni til aðrar verkætlanir.<br>Við tað at ein kai verður bygt uml. 100 metur út í fjørðin vil verandi rák/útskifting/súður viðurskiftir broytast. Tí er umráðandi at gera hesa kanning. |
| Grundarlag | • Umsókn um leingjan av fóðurkai við tekningum<br>• Sáttmáli millum fuglafjarðar kommunu og P/F Havsbrún<br>• Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd<br>• 21_00632-26 Góðkenningarskriv Fuglafjørður 304373_1_1 |

6

| | |
|---|---|
| | • 21_00632-12 FK j. nr. 21_00632_1_Plantekning nr. 01_09112021_PAP 287486_1_1 |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva treyta byggiloyvi samb. hesum treytum:<br>- Havsbrún fær ein umhvørvisárinsmeting, Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, gjørda áðrenn arbeiði fer í gongd.<br>- At víðkanin av fóðurbryggjuni verður hildin eftir byggisamtyktini og sáttmála við P/F Havsbrún §1, 98,2x97m.<br>- Allur nýggjur bryggjukantur verður gjørdur við spunsl.<br>- Dýpið við bryggjukanti verður avgjørt í samráð við Havnameistaran.<br>- Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>- Bruna- og tilbúgvingarætlan verður gjørd.<br>- Innsatsvegur verður min. 9 metur breiður parallelt við endan og min. 12 metur breiður parallelt við langsíðu á komandi bygningum á økinum.<br><br>Somuleiðis mælir tekninska deild til, at kommuna setur eina kanning í verk av rák/útskifting/súður av sjógvinum á fjørðinum. Har meinast við, at ein útrokning/kanning verður gjørd og at eitt fysiskt model verður gjørt, ið vísir viðurskiftini bæði núverandi støða og komandi broyting. Hendan kanning kann eisini brúkast seinni til aðrar verkætlanir.<br>Við tað at ein kai verður bygt uml. 100 metur út í fjørðin vil verandi rák/útskifting/súður viðurskiftir broytast. Tí er umráðandi at gera hesa kanning. | | |
| Dagf | 09.01.2024 | | |



**<u>Vinnu- og havnanevndin 16. januar 2024:</u>**
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara, men at innsatsvegurin verður min. 10 metur breiður parallelt við endan sum stendur í §5 í sáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og P/F Havsbrún frá 03. oktober 2019

**Býráðið 25. januar 2024:**
Málið varð samtyk við tað, at 8 býráðslimir tóku undir við tilmælinum frá Vinnu- og Havnanevndini. Sheila Sigurdsdóttir Sóldal atkvøddi blankt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 4/24
## 23/00579-1 Ognartøka av lendi til víðkan av Innandalsvegnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 14.12.2023 | 57/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2024 | 4/24 |
| 3 Býráðið | 25.01.2024 | 4/24 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd/ býráði |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Talan er um ognartøku av parti av fleiri matriklum við Innandalsvegin. Talan er um hesi matr.nr. 440( 50m2), 439 (50m2), 438 (55 m2) og 435 (350 m2). Ognartøkan er grunda á, at eigarnir eru deyðir og arvingarnir eru so nógvir, at neyðugt er at ognartaka hesar matriklar.<br>Onkur av hesum arvingum er ikki á lívi longur, sum eisini hava arvingar.<br><br>Av tí tað er trupult at fáa fatur á eftirkomarunum hjá upprunaligu arvingunum, at talan er um lutfalsliga lítlan part av hvørjum matrikli og harvið lutfalsliga lítla upphædd, verður mett at mest skynsamt er at ognartaka lendi.<br><br>Tá talan er um víðkan av vegi kann kommunan ognartaka uttan stórvegis trupulleikar.<br><br>Ognartøkan verður gjørd sambært § 12 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mei 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, seinast broytt við løtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrisskipanini §24 stk. 9 skal tekniska nevnd senda býráðnum um fíggjarnevndina tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum. |
| Grundarlag | • Kommunustýrisskipan hjá Fuglafjarðar kommunu og løgtingslóg nr. 13 frá 21. mei 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, seinast broytt við løtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Kort yvir lendi har ognartøka verður framd |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | ja | nei |
| | Umsitingarligar | ja | nei |
| Tilmæli | Mælt verður teknisku nevnd at taka undir við at ognartøku av hesum matriklum í Fuglafjarðar kommunu við tí endamáli at leggja tað saman við matr. nr. Litra r, í Fuglafjarðar kommunu og at tekniska nevnd mælir fíggjarnevndini og býráðnum at samtykkja hetta. | | |
| Dagf | 11.12.2023 | | |

**Tekniska nevnd 14. desember 2023:**
Tekniska nevnd mælir fíggjarnevndini til at fylgja tilmælinum frá tekniska leiðara

**Fíggjarnevndin 22. januar 2024:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum um ognartøku av lendinum fram við Innandalsvegnum, so møguligt verður at breiðka vegin.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðara, teknisku nevnd og Fíggjarnevndini.

## 5/24
## 23/00593-3 Umsókn um byggiloyi til frystitunnil og goymslutunnil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.01.2024 | 5/24 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 5/24 |

## Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd og Býráði |
| Stutt lýsing av málinum | Bergfrost søkir um at økja um frystugoymslu og goymslutunnil |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Bergfrost søkir um at økja um frystugoymslu og goymslutunnil til turrlagur, tvs. 2 tunnular við samanbinding millum verandi tunnlar og teir nýggju.<br>Tekniska deild mælir til at geva byggiloyvi við fylgjandi treytum:<br>- Komandi tunlar skulu matrikulerast. Víst verður til - Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.<br>- Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>- Bruna- og tilbúgvingaræatlan verður gjørd til allar tunlarnar.<br>- Tunlarnir skulu gerast út við neyð- og rýmingarljósi, ávaringarskipan, CO2 følara og øllum neyvum følarum til nýtsluna, brunaskápum, UHF- sambandi.<br>- Neyðugt luftskifti skipan verður gjørd í allar tunlarnar.<br>- Luftskiftis skipanin skal kunna virka sum brunaventilatión.<br>- Neyðugt geologiskt tilfar verður gjørt/fyriliggur áðrenn byrja verður.<br>- Tilfarið frá tunnilinum ikki verður lagt á havnalagnum uttan nærri avtalu<br>- Byggiharrin teknar neyðugar tryggingar av/fyri arbeiðinum, herundir spreingitrygging.<br>- Neyðug krøv til spreingitryggingina skulu gerast. |
| Grundarlag | • Umsókn um byggiloyvi av frystu- og goymslutunnil við tekningum |

Viðgerð

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva treyta byggiloyvi samb. fylgjandi treytum:<br>-Komandi tunnlar skulu matrikulerast. Víst verður til - Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.<br>-Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>-Bruna- og tilbúgvingarætlan verður gjørd til allar tunnlarnar.<br>-Tunnlarnir skulu útgerast við neyð- og rýmingarljósi, ávaringarskipan, CO2 følara og øllum neyvum følarum til nýtsluna, brunaskápum, UHF-sambandi.<br>-Neyðugt luftskifti skipan verður gjørd í allar tunnlarnar.<br>-Luftskiftis skipanin skal kunna virka sum brunaventilatión.<br>-Neyðugt geologiskt tilfar verður gjørt/fyriliggur áðrenn byrja verður.<br>-Tilfarið frá tunnilinum ikki verður lagt á havnalagnum uttan nærri avtalu við havnastjóran og tekniska leiðara.<br>-Byggiharrin teknar neyðugar tryggingar av/fyri arbeiðinum, herundir spreingitrygging.<br>-Neyðug krøv til spreingitryggingina skulu gerast. |
| Dagf | 10.01.2024 |

**<u>Vinnu- og havnanevndin 16. januar 2024:</u>** 12

Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**<u>Býráðið 25. januar 2024:</u>**

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og Vinnu- og havnanevndini.

## 6/24
## 24/00021-3 Málslýsing av umsókn um byggiloyvi til kai

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.01.2024 | 7/24 |
| 2 Býráðið | 25.01.2024 | 6/24 |

### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd og Býráði |
| Stutt lýsing av málinum | Framherji søkir um at leingja Ennikai við 80 metur. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Framherji søkir um at leingja Ennikaiðina við 80 metrum í ein sunnan(úteftir).<br>Tekniska deild mælir til at geva byggiloyvi við fylgjandi treytum:<br>- Framherji fær eina umhvørvisárinsmeting, Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, gjørda áðrenn arbeiði fer í gongd.<br>- At víðkanin av Ennikaini verður hildin eftir byggisamtyktini.<br>- Allur nýggji kaikantur verður gjørdur við spunsl.<br>- Anodir skulu staðsetast á spunsl áðrenn tey vera sett niður.<br>- Dýpið við bryggjukanti verður avgjørt í samráð við Havnameistaran, tó min. 16 metur dýpi.<br>- Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>- Vatnleiðingin skal vera Ø200 í nýggju kai<br>- A brandpostur skal vera fyri enda av kai staðsett í samráð við Átaksleiðaran.<br>- Ventilur,rørleiðing og koblingar í vatnkranabrunnum verða gjørd við syrufast rustfríum tilfari (sjógott).<br>- Ø110 dragirør skal eisini gerast úr el-brunni til talvuhúsið sunnanfyri (úteftir).<br>- Bjargingarstigi skal eisini staðsetast á suðurendanum. Hesir skulu vera í samráð við Havnameistaran.<br>- Asfalt løgini skulu vera Agb 16 LT og Ab 16LT.<br>- Verkætlanin skal eisini fevna um verjugrót, ið skal íbindast verandi verjugrótkasti<br>- Verkætlanin skal eisini fevna um flytan av verandi pullarti áljóðandi 75 tons longur suður |
| Grundarlag | • Umsókn um leingjan av Ennikai við tekningum<br>• Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva treyta byggiloyvi samb. hesum treytum:<br>- Framherji fær eina umhvørvisárinsmeting, Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, gjørda áðrenn arbeiði fer í gongd.<br>- At víðkanin av Ennikaini verður hildin eftir/innanfyri byggisamtyktini.<br>- Allur nýggji kaikantur verður gjørdur við spunsl.<br>- Anodir skulu staðsetast á spunsl áðrenn tey vera sett niður.<br>- Dýpið við bryggjukanti verður avgjørt í samráð við Havnameistaran, tó min. 16 metur dýpi.<br>- Byggiharrin kemur við neyvari tekningum og frágreiðingum.<br>- Øll nýggj vatnleiðingin skal vera Ø200 í nýggju kai<br>- A brandpostur skal vera fyri enda av kai staðsett í samráð við Átaksleiðaran.<br>- Ventilur,rørleiðing og koblingar í vatnkranabrunnum verða gjørd við syrufast rustfríum tilfari (sjógott).<br>- Ø110 dragirør skal eisini gerast úr el-brunni til talvuhúsið sunnanfyri (úteftir).<br>- Bjargingarstigi skal eisini staðsetast á suðurendanum. Bjargingarstigar skulu vera í samráð við Havnameistaran.<br>- Asfalt løgini skulu vera Agb 16 LT og Ab 16LT.<br>- Verkætlani skal eisini fevna um verjugrót, ið skal íbindast verandi verjugrótkasti.<br>- Verkætlani skal eisini fevna um flytan av verandi pullarti áljóðandi 75 tons longur suður.<br>- At sáttmáli millum FUGLAFJARÐAR KOMMUNU & P/F FRAMHERJI, SKRÁS.NR 1925 & P/F PELAGOS, SKRÁS.NR 5951 verður endaliga góðkendur og undirskrivaður av øllum pørtum | | |
| Dagf | 11.01.2024 | | |



**Vinnu- og havnanevndin 16. januar 2024:**

Vinnu- og havnanevndin fyldir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og Vinnu- og havnanevndini.

15

**7/24**

## 23/00482-1 Skipa, vøru- og leigugjøld fyri Fuglafjarðar havn endurskoðast

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 07.12.2023 | 21/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.11.2023 | 51/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.01.2024 | 7/24 |
| 4 Býráðið | 25.01.2024 | 7/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd, fíggjarnevnd, býráð | | |
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar Havn hevur eina vøruskrá, sum er galdani fram til 31. desember 2025. Tó so eru broytingar komnar í gjald av spill olju og burturkasti seinasta árið, sum ger at kommunan hevur eitt meirgjald fyri hesi enn hvat hon fær inn. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Formaður í vinnu- og havnanevndini hevur biði um at fingið vøruskránna fyri Fuglafjarðar havn endurskoðaða. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Gjaldskráin við viðmerkingum frá fíggjarleiðara fyriliggur<br>• Teldupostur frá havnameistaranum<br>• Gl. Gjaldskrá frá 2009 og frá 2013-2017 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Til viðgerðar og gjøgnumgongd | | |
| Dagf | 10.11.2023 | | |

16

**Fíggjarnevndin 27. november 2023:**
Fíggjarnevndin útsetir viðgerðina av málinum til tað er viðgjørt í Vinnu- og Havnanevndini.

**Vinnu- og havnanevndin 07. desember 2023:**
Vinnu- og havnanevndin hevur gjøgnumgingið vøruskránna og viðmerkt broytingar sum eru skrásettar í *dagført hefti um skipa- og vøruskrá.*
Vinnu- og havnanevndin mælir einmælt fíggjarnevndini til at taka undir við broytingunum sambart *dagført hefti um skipa- og vøruskrá.*

**Fíggjarnevndin 22. januar 2024:**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt broytingar og gjørt tillagingar, sum mælt verður til, at býráðið tekur undir við.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við broytingunum í vøruskránni.

17

**8/24**
**23/00373-3 Kappingarskrá til hugskotskapping um miðbýarætlani Fuglafirði**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.01.2024 | 8/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Umsitingin hevur eftir ynski frá einum samlaðum býráði, saman við uttanhýsis ráðgeva snikkað eina kappingarskrá til, sum verður grundarlag undir eini hugskotskapping um miðbýarætlan fyri Fuglafjørð.<br><br>Peningur er settur av til fyrireikandi arbeiði í 2023, meðan peningur til útboð er settur av í 2024.<br><br>Arbeiði er nú komið so mikið áleiðis at býráðið verður biðið um, at taka støðu til um farast skal viðari við arbeiðnum har kappingarskráin verður nýtt sum grundarlag undir at innbodnar teknistovur kunnu kappast um hugskot til miðbýarætlan. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Býráðið skal taka støðu til víðari gongdina í ætlanini at fáa eina miðbýarætlan fyri Fuglafjørð. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Kappingarskrá – miðbýarætlan.doc | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir býráðnum til at farið verður víðari við verkætlanini út frá Kappingarskránni og at:<br>1. Heitt verður á tríggjar teknistovur, um at luttaka í kappingini um miðbýarætlan í Fuglafirði.<br>2. Miðað verður móti at innbodnu teknistovurnar fáa tilfarið 1. februar og at uppskotini skulu verða avleverað 3. juni 2024.<br>3. Í mesta lagi 750 tkr. verða nýttar til virðislønir. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 22.01.2024 |
| --- | --- |

**Býráðið 25. januar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá borgarstjóranum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 21.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Bergtóra Cedeiusdóttir

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Sheila Sigurdsdóttir Sóldal

Ólavur Larsen

Bartal Eliasen